# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Er valstríðið byrjað?

Løgtingsformaðurin er ikki vanur at leypa framav. Edmund Joensen er tvørturímóti kendur fyri at hugsa seg væl um og fyri ikki at vera harðligur í orð og talu. Sum tingformaður hevur hann verið bæði sera tignarligur og sera siðiligur, og hann hevur dugað væl at hildið seg burtur fra tí dagliga politiska tjakinum, har støðið mangan er so sum so. Edmund hevur sum tingformaður stóra virðing og stórt álit millum tingmenn og manna millum sum heild. Men nú hevur tingformaðurin so loyst frá posabandinum, og hann fer ikki fram við mýkindum. Edmund Joensen vil vera við, at hóast trý ár eru farin og sett er á fjórða hjá samgonguni, so sæst ikki enn nakað tekin til nakra samlaða politiska ætlan, sum kann føra Føroyar fram á leiðina.

Tað tykist sum øll tjóðin bíðar eftir rapportum frá embætisfólkunum, sigur løgtingsformaðurin, ið heldur, at vit hava nóg mikið av rapportum. Hvørjum bíða vit eftir, annað enn politiskum avgerðum? Eru tað ikki politiskar avgerðir, sum tróta? Bíðitíðin eftir rapportum má ikki verða brúkt sum skjól fyri at síggja út av onkrum, sum ikki er. Nú eru ovmikið av rapportum um at tryggja karmarnar hjá privatu vinnuni, men kortini haltar í ólukkumát, heldur Edmund.

Hann ótolnast eftir privatiseringunum og ger vart við, at vit bíða eftir politiskum avgerðum ikki minst við atliti at Europa og sum skilst: vinnupolitikkinum.

Tá hugsað verður um, hvussu friðarligt tað hevur verið í samgonguni hesi trý árini, so eru hesi orð tingformansins ein verulig skola og ein hvøkkur, sum eingin í samgonguni sleppur undan at fyrihalda seg til. Edmund er ikki hvør sum helst. Hann hevur landsins hægsta sess, er fyrrv. løgmaður og hevur mestsum gurustatus í Sambandsflokkinum. So er spurningurin, hví hann kemur út við hesum álopi júst nú og hvussu hinir flokkarnir svara aftur.

Vit eru, sum Edmund sjálvur vísir á, í einum valári. Hetta tykist vera tekin um, at valstríðið hjá Sambandsflokkinum longu er byrjað. Ávísir tingmenn í samgonguni eru eisini farnir at markera seg av álvara. Hetta er helst eisini eitt dømi um, at tingmenn eru frustreraðir um, at samgonguskjalið kann tykjast vera sett til viks av visjónsarbeiðinum, og at politiska arbeiðið tískil í ov stóran mun er latið embætisfólkunum. Hetta hevur jú leingi verið ákæran frá andstøðuni. Er henda tulking røtt, so má løgmaður taka eitt ódnartak her og nú. Hann má áleggja sínum landsstýrismonnum at avgreiða stóru málini í samgonguskjalinum her í vár, soleiðis at samgongan stendur sum ein sterk virkisfús eind við einum greiðum politikki og ikki sum ein ósamd skipsmanning, har hvør í sínum lagi egnir sína línu.

**Sosialurin**

Fiskimannafelagið:

## Tað finnast nógvar aðrar uppgávur

ÓLI JACOBSEN



Sjónarmiðini hjá mótvalevnunum til verandi formann hava stórt sæð verið avmarkað til sáttmálar, tryggingarviðurskifti, pensjónsmálið og ALS.

Hetta eru sjálvsagt alt týdningarmikil viðurskifti, sum FF longu arbeiðir við, sum tað eisini sæst í okkara ársfrágreiðingum. Sum við øllum kann verða arbeitt betri við hesum viðurskiftum. Men tað heldur verandi leiðsla í FF seg vera føra fyri at gera, eisini tá hugsað verður um úrslit, sum longu eru nádd.

Men tað finnast mong onnur viðurskifti, sum felagið arbeiðir við, sum er. Tað hevur verið nevnt fyrr, at ein sera stór uppgáva er at tryggja fiskimonnum "rættan" prís fyri fiskin. Her hevur felagið verið virkið tey seinastu mongu árini, sum tað er greitt frá aðrastaðni í blaðnum. Seinast var tað við uppskotinum um uppbýtið av fiskamarknaðinum í tvey feløg, og virkar fiskamarknaðurin tískil betri enn nakrantíð. Ein onnur uppgáva hevur verið at vera við til at tryggja fiskidagatalið hjá skipunum. Tað er nógv, sum hendir á politiska frontinum, sum fiskimenn meta sum eina hóttan, sum t.d. uppskotini um at teir nú skulu gjalda fyri at sleppa at fiska.

FF hevur nýtt nógv kreftir at vísa grundgevingunum aftur, og tað gerst í hvussu er best við at hava eina vitan um hesi viðurskifti.

Eitt annað dømi um virksemið hjá FF er tann fasti gerðarrætturin, sum beint er skipaður at loysa trætumál á arbeiðsmarknaðinum. Her er friður komin um hetta mál, eftir at fleiri landsstýri hava rent seg føst við uppskotum um arbeiðsrætt, sum stórur partur av fakfeløgunum ikki vilja vita av.

Tá Óli Jacobsen var í landsstýrinum í 1998, setti hann eina nevnd við umboðum fyri fakfeløg og arbeiðsgevarar, sum fekk til uppgávu at koma við einum uppskoti til skipan, sum kundi loysa trupulleikan við slíkum trætum, sum ofta endaðu við tiltøkum av ymiskum slagi. Henda nevndin kom ikki á mál, men tá Bjarni Djurholm rendi seg fastan við sínum uppskoti um arbeiðsrætt, fekk hann til ráð at nýta sama leistin sum hjá Óla í 1998. Hesin leistur hevur nú ført til máls við eini nærum fullkomnari semju millum mótpartarnar á arbeiðsmarknaðinum um eina skipan á økinum.

Tað er soleiðis, at ein eigur at arbeiða, og soleiðis at úrslit kunnu náast.

**Gott við vali**

Tað er eingin ivi um, at tað er sunt við einum slíkum vali sum hesum. Undir øllum umstøður verður sett fokus á ymisk viðurskifti hjá fiskimonnum, sum tann, ið enn verður valdur, má gera nakað við.

Vónandi verður hetta eisini gott fyri felagslívið. Tað er eingin ivi um, at FF tørvar nýggj og ung fólk, sum vilja vera virkin í felagnum. Tí skal hetta eisini vera ein áheitan á ein og hvønn um at vera við til at dugna felagnum.

Nú verður ikki meira skrivað upp undir hetta formansvalið. Men fiskimenn vita í hvussu er, hvat tey trý alternativini standa fyri.

Minnist til, at atkvøðuseðilin skal vera grannskoðara felagsins í hendi í seinasta lagi týsdagin 30. januar.

## Neyvari frágreing um uppskotið frá landsstýrismanninum

FELAGIÐ FØROYSKIR SJÚKRARØKTARFRØÐINGAR

Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar hevur fingið "Uppskot til skipan av ljósmøðravirkseminum í Føroyum" til hoyringar frá Almanna- og Heilsumálaráðnum og nevndin hevur viðgjørt tað á nevndarfundi í dag, 19.01.2007.

Eftir at hava viðgjørt uppskotið, eru vit komin til ta niðurstøðu, at senda landsstýrismanninum í Almanna- og Heilsumálum eitt skriv, við áheitan um fund, fyri at fáa neyvari frágreiðing um innihaldið í uppskotinum, áðrenn vit kunnu taka støðu til og gera viðmerkingar til hoyringsskrivið, ið skal verða avgreitt innan 30.jan. 2007.

Arbeiðsøki hjá sjúkrarøktarfrøðingum er heilsu- og sjúkrarøkt, t.v.s. at dentur verður lagdur á heilsufremjan, sjúkufyribyrgjan, røkt og viðgerð av sjúkum, tí er ein av týðandi spurningunum vit ynskja meira útgreinaðan, uppbýtið av arbeiðsøkinum í frískt og sjúkt.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Bjarta Joensen bjarta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.